# Ellipsusukapað passepartout



Hvíta ella litaða pappírið, sum verður sett uttan um myndir, nevna vit passepartout (*paspartu*), sí myndina høgrumegin við bláum passepartout.

Her skulu vit læra at gera ellipsuskapað passepartout.

Ellipsan er løtt at tekna. Legg eitt pappír á eina plátu ella annað undirlag.
Fest ein tráð millum tvær teknistiftir og set stiftirnar fastar á pappírið, so at frástøðan teirra millum er styttri enn tráðurin. Spenn tráðin við einum blýanti og halt hann strektan meðan tú teknar allan vegin runt.

Skapið á ellipsuni kanst tú broyta við at flyta teknistiftirnar.

Nú tú hevur lært at tekna ellipsur kanst tú gera spennandi litað ellipsuskapað passepartout, sí myndina niðanfyri.

Ger nú fleiri slík passepartout ella kort í ymsum litum.

Royn eisini at broyta skapið á ellipsunum.





